# Krosstein www.krosstein.fo

Pf. Svend

## Goymslufólk

Søkt verður eftir einum fólki m/k til goymslu okkara at byrja skjótast gjørligt. Fyrimunur er um umsøkjarin hevur goymslu- ella handilsútbúgving, men hetta er ikki nakað krav.

Nærri upplýsningar um starvið fáast við at ringja til okkara og spyrja eftir Svend Kross- tein ella Anniku Krosstein.

Hevur hetta tín áhuga, so send okkum eina umsókn við prógvum og viðmælum innan 30.10.06.

**Falkavegur 6 · FO-110 Tórshavn**
**Tel. 34 46 00 · Fax. 34 46 01**
**E-mail: krosstein@krosstein.fo**

**VHS** Alt tilfar til VATN · HITAVERK · SANITET · VENTILATIÓN

P/F Svend Krosstein er einasta HVS-heilsøla í landinum, og hevur eisini størsta HVS-handil í landinum. Vit selja m.a. alt tilfar til kloakleiðingar, vatnleiðingar, hita og sanitet og veiðireiðskap.
Í fyritøkuni starvast í løtuni 18 fólk.

Sosialurin 341 800

Tíðaravmarkað starv og útbjóðing

# Avgreiðslu- og vaskifólk

Í sambandi við farloyvi verður við hesum søkt eftir avgreiðslufólki til farmastøðina á Drelnesi at seta í tíðaravmarkað starv sum skjótast og fram til 31. oktober 2007. Eisini verður reingerð av Farstøð á Krambatanga og Farmastøð á Drelnesi boðin út.

Freistin at søkja starvið sum avgreiðslufólk og at lata inn tilboð upp á reingerðingina er 23. oktober 2006.

Sí lýsingina á heimasíðu okkara www.ssl.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS

sansir.fo

PhotoCare

*PhotoCare letur upp í nýggjum hami*







**Mánadagin 16. oktober kl. 09.00**
letur PhotoCare upp í nýggjum hami.

**Vit taka okkum m.a. av**

- passmyndum
- digitalum myndum
- allari myndaviðgerð
- sølu av digitalum myndatólum
- sølu av DVD video upptøkutólum

**Øll framkalling - 50%**
mánadagin og týsdagin

31 7 9 13

Dr. Jakobsensg. 12
njac@kallnet.fo

STARVSLÝSING

# Blandimeistari

Søkt verður eftir dugnaligum og álitandi blandimeistara til asfaltverkið í Hundsarabotni at byrja skjótast gjørligt. Asfaltverkið hevur um hendi asfaltframleiðsluna hjá Landsverki.

**Arbeiðsuppgávur**
Sum blandimeistari hevur tú ábyrgdina av:
- Dagliga rakstrinum av asfaltverkinum saman við formanninum í Hundsarabotni, herundir planlegging av arbeiðnum
- At skipa fyri viðlíkahaldi av verkinum, herundir eisini fyribyrgjandi viðlíkahald
- Samskiftinum við kundar

Í tíðarskeiðnum apríl til november, tá ið asfalteringin fer fram, kann roknast við longum arbeiðsdøgum. Roknast kann við, at tú skalt luttaka í øðrum arbeiði í Hundsarabotni ein part av vetrarhálvuni, tá ið asfaltverkið liggur stilt.

Upplæring í at reka asfaltverkið verður í Hundsarabotni.

**Førleikakrøv**
Sóknast verður eftir fólki við handverkaraútbúgving t.d. maskinsmiður, ella aðrari viðkomandi útbúgving. Tú hevur góð samstarvsevni, skal duga at skipa títt arbeiðsøki og geva títt íkast til menning av arbeiðsplássinum, umframt vera førur fyri at arbeiða sjálvstøðugt.

Harumframt skalt tú hava áhuga fyri at arbeiða við KT. Tað er ein fyrimunur, um tú hevur royndir við at arbeiða við Excel-rokniarki og Word-tekstviðgerð.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Starvið er fastlønt.

**Umsóknir**
Umsóknir skulu sendast til lv@lv.fo ella:

Landsverk,
Postsmoga 78,
110 Tórshavn,

og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 24. oktober, 2006. Merk umsóknina "Umsókn blandimeistari" og viðmerk í umsóknini, hvar tú hevur sæð starvslýsingina.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Friðjón Jacobsen, formann, á fartel. 540 960 ella Torkil Olsen, deildarleiðara, á fartel. 540 841.

REPROZ

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land

*Landsverk er ein stovnur undir Vinnumálaráðnum, og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvallamál, herundir tyrlupallar.*